

# Nógvar grillir í Klaksvík

Áhugin fyri at grilla er stórur í Klaksvík eins og í restini av landinum. "Vit hava 15 ymisk sløg av gassgrillum í ár" greiðir Richard hjá KBI í Klaksvík frá. Umframt at vera amboðshandil, er KBI gassumboð í Norður Oyggjum. Handilin seldi gass til fleiri, ið høvdu gass grillir. Tí varð í fjør avgjørt at taka nakrar gassgrillir heim sum eina roynd. Hetta gjørdist ein sera væl eydna roynd, tí øgiliga nógvar grillir vórðu seldar, greiðir Richard frá.

Tí hava KBI í ár munandi fleiri grillir til sølu, nú grilltíðin aftur nærkast. Richard sigur, at orsøkin til at gass grillir eru so vælumtóktar millum føroyingar, ivaleyst er tað skiftandi føroyska veðrið. Ein gassgrill skal ikki hitast upp í ein tíma, áðrenn hon er nóg heit, tí kanst tú í eini handavending grilla, meðan sólin skínur eina løtu.

Nógv hava grillina standandi frammi alt summarið og blaka ein búff á hana, sjálvt um veðrið ikki er nóg gott til at eta úti, grillin gerst tí eitt annað tól í húsarhaldinum í gerandisdegnum.




















